umhvørvisstovan

Argir, 17. mars 2011
j.nr: 11/00129-3
Málsviðgeri: SF/RT

# Uppskot

# til

# kunngerð um broyting í kunngerð um adressur

Í kunngerð nr. 69 frá 13. oktober 2004 um adressur, verða gjørdar hesar broytingar:

## § 1

1) § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Við adressu skilst eitt navn og eitt nummar við møguligum tilhoyrandi bókstavi, sum eintýtt sigur, hvar adressueindin, sbrt. stk. 2, er í býnum ella bygdini."

2) Í § 1 verður sum nýtt stk. 3 sett:
"*Stk. 3.* Tá fleiri adressueindir hava somu inngongd, verður uppískoytið, ásett í § 4, stk 3, brúkt afturat ásetingunum í stk. 1."

3) § 3 verður orðað soleiðis:
"**§ 3.** Adressa skal tillutast øllum bygningum, sum verða nýttir til:
a) bústaðarendamál,
b) frítíðarendamál,
c) vinnuendamál, og
d) virksemi hjá tí almenna.
*Stk. 2.* Somuleiðis kann adressa tillutast til annað virksemi, har nógv fólk kemur saman, t.d. ítróttaøki, parkeringsøki, kirkjugarðar o.a.t..
*Stk. 3.* Óbygdir eigindómar, har ætlanin er at byggja bygningar til endamál sbrt. stk. 1, skulu sum meginregla tillutast adressur."

4) Í § 4, stk. 2 verður "sum uppískoyti" broytt til: "afturat nummarinum".

5) § 4, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Uppískoyti til adressueindir eftir § 1, stk. 3, verða skipað soleiðis:
a) Hava adressueindirnar somu inngongd, skrásetur uppískoytið hæddirnar við tølunum: 0, 1, 2, 3 o.s.fr. Kjallarahæddin / veghæddin verður skrásett sum hædd 0.
b) Eru adressueindirnar á somu hædd, skrásetur uppískoytið hesar antin við frámerkjunum hm, mi, vm, ella við talmerkingunum: 1, 2, 3, 4 o.s.fr. Talmerkt verður við klokkuni.
c) Eru adressueindirnar undir jørð, skrásetur uppískoytið hesar við tølunum: -1, -2 o.s.fr."

6) § 4, stk. 4 verður strikað.

7) Í § 5, stk. 2 verður "Stavir" broytt til: "Bókstavir".

8) Í § 9. verður "Matrikulstovuni" broytt til "Umhvørvisstovuni".

## § 2.

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Annika Olsen**
landsstýrismaður

/ Rúni Joensen